

# Statoil setur hol á 2014 við tveimum fundum

**Jan Müller**

02.01.2014 - 22:57

Oljan.fo

Eftir at hava verið tað oljufelagið í heiminum, sum hevur gjørt flest olju- og gassfund seinastu árini, legði Statoil eisini út í nýggja árinum við ikki færri enn tveimum olju- og gassfundum.

Statoil hevur sum fyristøðufelag saman við partnarum gjørt eitt gassfund í Askja Vest leitimiðinum og eitt oljufund í Askja Øst leitimiðinum í Norðsjónum.

"Vit eru væl nøgd við at seta hol á 2014 við tveimum fundum, her í hjartanum á Norðsjónum. Hetta vísir, at sjálvt tey mest búnu økini av norska landgrunninum framhaldandi goyma spennandi møguleikar fyri virðisøking," sigur May-Liss Hauknes, leitistjóri hjá Statoil í Norðsjónum.

Tað er boripallurin Ocean Vanguard, sum hevur borað tveir brunnar í økinum millum Oseberg- og Frigg-feltini. Statoil metir, at nýggju fundini eru millum 19 og 44 mió. tunnur av olju.

“Norðsjógvurin hevur verið og er framhaldandi eitt sera gott stað at finna olju og gass, og sum hevur latið olju og gass í samfull 40 ár. Og her eru enn góðir møguleikar fyri at finna nýggj olju- og gassfelt,” sigur Hauknes.

Statoil stendur til at bora tíggjutals brunnar í ár og tveir teirra eru í Føroyum.




